## Knappar 100.000 krónur fyri landsdystin

Sjónvarpið hjá Kringvarpi Føroya valdi ikki at senda landsdystin millum Italia og Føroyar í gjár. Stovnurin hevur ikki pengar at fíggja sjónvarpsrættindini, varð sagt í tíðindunum í útvarpinum í gjár. Kostnaðurin fyri dystin var knappar 100.000 krónur, og tað er ov nógv, metir Annika Mittún Jacobsen, stjóri í Kringvarpinum, sambært tíðindunum í útvarpinum. Útvarpið segði hinvegin beinleiðis frá dystinum.



**KLASSAMUNUR**

*Føroysku landsliðsleikararnir høvdu stundum trupult við at fáa bóltin av skjótu italiumonnunum. Fabio Quagliarella økir her til 4-0*

Mynd: Polfoto

ikki verið drúgvur á landsliðnum seinastu árini. Trupulleikar hava verið millum hann og undanfarnu venjararnar.

Cassano stóð fyri sigursmálinum, tá Italia vann í Estlandi fríggjakvøldið, og í gjár var hann millum mest eyðsýndu leikararnar í Firenze.

Prandelli er fegin.

– Hann er væl fyri og hevur tikið týðandi uppgávur á sínar herðar. Hann hevur staðið seg væl hesar dystirnar, hann hevur skotið mál og hann stuðlar teimum ungu sera væl, staðfestir Prandelli.

### Kerr valdi broytingar

Brian Kerr valdi at fremja tríggjar broytingar í byrjunaruppstillingini frá landsdystinum fríggjadagin.

Egil á Bø var í miðverjuni við Atla Gregersen. Ætlanin var helst, at stóru føroyingarnir skuldu vinna luftbóltarnar í føroyska brotsteiginum. Tað eydnaðist. Men tá heimaliðið rann bóltin inn í brotsteiginum, høvdu teir stundum trupult við at fáa bóltin av skjótu italiumonnunum.

Bogi Løkin var á miðvøllinum fyri Christian Lamhauge Holst. Dysturin móti Serbia var strævin, og tað merktist.

Miðvøllurin gav heimaliðnum ov nógv pláss at spæla á. Stríðsviljin, sum Kerr hevur ofta fingið fram, var ikki eyðsýndur í gjár. Serliga tóktist Jann Ingi Petersen troyttur.

Tað er saknur í Jákupi á Borg, sum royndist sera væl á miðvøllinum móti Litava á Svangaskarði í fjør, og í Estlandi fyrr í summar.

Fróði Benjaminsen stríddist sum vanligt.

Men hinvegin – Italia var klassar oman fyri føroyingarnar.

*uni@sosialurin.fo*

## **Italia – Føroyar** 5-0 (3-0)

Dómari: Aleksei Kulbakov, Hvítarussland
Linjuverjar: Dimtry Zhuk og Vitali Maliutsin, Hvítarussland
**1-0: Alberto Gilardino, 11.**
**2-0: Daniele De Rossi, 22.**
**3-0: Antonio Cassano, 27.**
**4-0: Fabio Quagliarella, 81.**
**5-0: Andrea Pirlo, 90.**

**Italia:** Emiliano Viviano, Bologna – Lorenzo De Silvestri, Fiorentina, Leonardo Bonucci, Juventus, Giorgio Chiellini, Juventus, Luca Antonelli, Parma – Riccardo Montolivo, Fiorentina, Andrea Pirlo, AC Milan, Daniele De Rossi, AS Roma – Giuseppe Rossi, Villarreal, (Fabio Quagliarella, Juventus, 59.) Alberto Gilardino, (Giampaolo Pazzini, Sampdoria, 59.) Fiorentina, Antonio Cassano, Sampdoria
Gult kort: Eingin
Venjari: Cesare Prandelli

**Føroyar:** Gunnar Nielsen, Tranmere Rovers – Jóhan Troest Davidsen, NSÍ, Egil á Bø, EB/Streymur, Atli Gregersen, Ross County, Hendrik Rubeksen, HB – Bogi Løkin, NSÍ, (Jónas Tór Næs, B36, 74.) Fróði Benjaminsen, HB, Jann Ingi Petersen, NSÍ, Christian Mouritsen, B36, (Christian Lamhauge Holst, Silkeborg, 74.) Símun Samuelsen, HB – Jóan Símun Edmundson, Newcastle (Daniel Udsen, EB/Streymur, 89.)
Gult kort: Jóhan Troest Davidsen
Venjari: Brian Kerr

| | Italia | Føroyar |
|---|---|---|
| Mál: | 5 | 0 |
| Skot á mál: | 8 | 2 |
| Hornaspørk: | 7 | 1 |
| Fríspørk: | 9 | 10 |
| Rangstøða: | 6 | 0 |
| Gul kort: | 0 | 1 |
| Reyð kort: | 0 | 0 |

*Hagtøl frá UEFA.com*

# Úrslitini í gjár:

Fleiri av smærri fótbóltstjóðunum mistu á stokkinum í gjár. Eysturríki fekk bæði málini móti Kasakstan í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat. Thomas Kahlenberg var hetjan í donsku Parkini, tá hann stóð fyri sigursmálinum móti Íslandi í seinastu sekundunum, og Skotland fekk somuleiðis sigursmálið í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat í heimadystinum móti Luksemburg. Litava vann á útivølli móti Kekkia.

*uni@sosialurin.fo*

**BÓLKUR A:**

| | |
|---|---|
| Turkaland – Belgia | 3-2 |
| Eysturríki – Kasakstan | 2-0 |
| Týskland – Aserbadjan | 6-0 |

**BÓLKUR B:**

| | |
|---|---|
| Russland – Slovakia | 0-1 |
| Makedonia – Armenia | 2-2 |
| Írland – Andorra | 3-1 |

**BÓLKUR C:**

| | |
|---|---|
| Serbia – Slovenia | 1-1 |
| Italia – Føroyar | 5-0 |

**BÓLKUR D:**

| | |
|---|---|
| Hvítarussland – Rumenia | 0-0 |
| Albania – Luksemburg | 1-0 |
| Bosnia-Herseg. – Frakland | 0-2 |

**BÓLKUR E:**

| | |
|---|---|
| Svøríki – San Marino | 6-0 |
| Holland – Finnland | 2-1 |
| Ungarn – Moldova | 2-1 |

**BÓLKUR F:**

| | |
|---|---|
| Georgia – Ísreal | 0-0 |
| Malta – Letland | 0-2 |
| Kroatia – Grikkaland | 0-0 |

**BÓLKUR G:**

| | |
|---|---|
| Bulgaria – Montenegro | 0-1 |
| Sveis – Ongland | 1-3 |

**BÓLKUR H:**

| | |
|---|---|
| Danmark – Ísland | 1-0 |
| Noreg – Portugal | 1-0 |

**BÓLKUR I:**

| | |
|---|---|
| Kekkia – Litava | 0-1 |
| Skotland – Likstinstein | 2-1 |